## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul av útsynningi, men hann minkar vindin seinnapartin. Sólglottar, men okkurt ælið fyrrapartin. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Fleyr til gul av vestri ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 12 stig.

– – –

Mars mánaði var eitt sindur kaldari enn miðal, 3,6° móti miðal 3,9°.
Avfallið var lítið, 72,9 mm, móti miðal 138,6 mm.

# Fullfermd skip á Fuglafirði við svartkjafti



*Á Havsbrún arbeiða tey lodnu í januar og februar og svartkjaft í mars, apríl og út í mai mánaða, til skipini fara aftur á sild*

**Ein skoti og ein íri landaðu í Fuglafirði í páskavikuni.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Svartkjaftafiskiskapurin hevur verið hampiliga góður í seinastuni. Í løtuni royna skipini vestanfyri Rock All. Svartkjafturin ferðast spakuliga norðureftir, og væntandi verður hann í føroyskum sjógvi um hálvan apríl ella so.

Trý fullfermd føroysk skip hava landað svartkjaft til Havsbrún í Fuglafirði í vikuni.

Týsdagin var Krúnborg inni við 2500 tonsum, Christian í Grótinum var í gjár við 2000 tonsum, og í dag kemur Jupiter við 1500 tonsum.

Í síðstu viku – vikuni fyri páskir – var ein skotskur og ein írskur bátur á Fuglafirði við svartkjafti; skotin hevði 900 tons og írin 2000 tons.

### Bara svartkjaftur

- Í løtuni fáa vit bara svartkjaft, og soleiðis verður tað helst, til skipini fara á sildaveiði tíðliga í summar.

Á Havsbrún arbeiða tey vanliga lodnu í januar og februar og svartkjaft í mars, apríl og út í mai mánaða, til skipini fara aftur á sild.

– Her hevur verið nokk at tikist við seinastu vikurnar, siga tey á Havsbrún í Fuglafirði.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷16 |
| Nuuk | ÷4 |
| Qaqortoq | ÷2 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | 9 |
| Halifax | 9 |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 8 |
| London | 15 |
| Tromsø | 1 |
| Bergen | 10 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 11 |
| Keypmannah. | 13 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | ÷2 |
| Berlin | 16 |
| Warzawa | 13 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 14 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 16 |
| Róm | – |
| Malorca | 13 |
| Athen | 16 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 16 |
| Beijing | 20 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 25 |
| New York | 11 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | 24 |
| Panama | 33 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 22 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 982 hPa. vestan fyri Skotland fer spakuliga í útnyrðing. Ein hátrýstryggur sunnan fyri Hvarvið verður yvir Føroyum hóskvøldið.




Lágtrýstið vestan fyri Skotland grynnist og hátrýstið yvir Finlandi breiðir seg móti Suður-Noreg.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 02/04 kl. 06[00]– 03/04 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 6,9°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° Mesti hiti máldur í apríl: 15,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,6 mm – mált frá 02/04 kl. 06[00]– 03/04 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 2,6 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

28. mars: Fullmáni/Mánin næstur jørðini
4, apríl: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. apr | 00.52 | 13.33 | — | 12.33 | 00.07 | 12.48 | 02.52 | 15.33 | 03.52 | 16.33 | 11.48 | — | 10.48 | 23.28 | 01.07 | 13.48 | 02.07 | 14.48 | 00.37 | 13.18 | 01.52 | 14.33 |
| 5. apr | 02.13 | 14.54 | 01.13 | 13.54 | 01.28 | 14.09 | 04.13 | 16.54 | 05.13 | 17.54 | 00.28 | 13.09 | — | 12.09 | 02.28 | 15.09 | 03.28 | 16.09 | 01.58 | 14.39 | 03.13 | 15.54 |
| 6. apr | 03.18 | 15.43 | 02.18 | 14.43 | 02.33 | 14.58 | 05.18 | 17.43 | 06.18 | 18.43 | 01.33 | 13.58 | 00.33 | 12.58 | 03.33 | 15.58 | 04.33 | 16.58 | 03.03 | 15.28 | 04.18 | 16.43 |
| 7. apr | 04.06 | 16.29 | 03.06 | 15.29 | 03.21 | 15.44 | 06.06 | 18.29 | 07.06 | 19.29 | 02.21 | 14.44 | 01.21 | 13.44 | 04.21 | 16.44 | 05.21 | 17.44 | 03.51 | 16.14 | 05.06 | 17.29 |













5 707265 100043 >